Gmail

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya <blf@blf.fo>

# Re: TIL UMMÆLIS. Uppskot til løgtingslóg um at keypa fastogn í Føroyum. Freist 23. apríl

**Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya** <blf@blf.fo> 19. april 2021 kl. 13.17
Til: Nella Festirstein <nellaf@tinganes.fo>

Góðan dagin,

BLF hevur fingið uppskot til løgtingslóg um at keypa fastogn í Føroyum til ummælis.

BLF hevur ikki viðmerkingar til lógaruppskotið. Um uppskotið skal síggjast sum ein byrjan til økta regulering á fastognarøkinum í Føroyum, ynskir BLF framhaldandi at vera hoyringspartur.

*Vinarliga, vegna BLF,*

*Elisabeth F. Rasmussen, formaður*

Den tir. 23. mar. 2021 kl. 12.51 skrev Nella Festirstein <nellaf@tinganes.fo>:

> Hjáheft verður sent tykkum til ummælis *Uppskot til løgtingslóg um at keypa fastogn í Føroyum*
>
> **Freistin at senda ummæli er fríggjadagin 23. apríl.**
>
> Ummæli skal sendast til nellaf@tinganes.fo
>
> **Uppskotið í stuttum**
>
> Endamálið við lógaruppskotinum er:
>
> - at tryggja at tann, sum eigur fastogn í Føroyum hevur tilknýti til Føroyar,
> - at tryggja at talið av útlendingum, sum eiga fastogn í ávísum økjum í Føroyum ikki verður ov høgt, og
> - at uppskotið ikki setur óneyðugar forðingar fyri útlendskum vinnuvirksemi í Føroyum.
>
> Loyvisskipan:
>
> Øll, sum búgva fast í Føroyum – uttan mun til tjóðskap – kunnu keypa fastogn uttan at søkja loyvi áðrenn. Persónar, sum ikki aktuelt búgva í Føroyum, men sum hava búð í Føroyum í samanlagt 5 ár, kunnu eisini keypa fastogn uttan at søkja loyvi.
>
> Persónar, sum ikki hava fastan bústað í Føroyum, og sum heldur ikki hava búð í Føroyum í samanlagt 5 ár, skulu søkja landsstýrismannin um loyvi at keypa fastogn í Føroyum.
>
> Somuleiðis skulu feløg o.o., sum ikki hava heimstað í Føroyum søkja um loyvi, áðrenn fastogn verður keypt.
>
> Um loyvi skal gevast persóni, sum ikki hevur fastan bústað í Føroyum, og sum heldur ikki hevur búð í Føroyum í samanlagt 5 ár, er ein ítøkilig avgerð í hvørjum einstøkum føri.

**Uppskotið er sent beinleiðis til:**

- Almannamálaráðið
- Heilsumálaráðið
- Uttanríkis- og mentamálaráðið
- Umhvørvis- og vinnumálaráðið
- Fíggjarmálaráðið
- Fiskivinnumálið
- Tinglýsingin
- Útlendingastovan

- TAKS
- Brúkaraumboðið
- Skráseting Føroya
- Dátueftirlitið
- Fróðskaparsetur Føroya
- Vinnuhúsið
- Føroya rættur
- Føroya Kommunufelag
- Advokatfelag Føroya
- BLF
- Skyn
- Betri Heim
- Meklarin
- MEGD
- Útoyggjafelagið
- Bústaðir

Uppskotið er eisini lagt alment út á ummælisportalin hjá Føroya landsstýri, so øll hava møguleika at senda inn ummæli.

Vinarliga

Nella Festirstein

Deildarstjóri

Løgmansskrivstovan
Lógartænastan

Beinleiðis tlf: +298 55 80 76